# Álit

# í

**løgtingsmáli nr.  159/2018: Uppskot til eykajáttanarløgtingslóg fyri mars 2019**

Kári P. Højgaard, Bill Justinussen og Magnus Rasmussen, løgtingsmenn, hava lagt málið fram 7. mars 2019, og eftir 1. viðgerð 15. mars er tað beint Fíggjarnevndini.

Nevndin hevur viðgjørt málið á fundi 21. mars 2019.

Undir viðgerðini hevur nevndin havt fund við Runavíkar kommunu og við landsstýrismannin í samferðslumálum.

**Meirilutin** (Bárður á Steig Nielsen, Jacob Vestergaard,  Kristin Michelsen og Bill Justinussen) vísir á týdningin at bøta um vegaføringar í vakstrarøkjum. Í Oyndarfirði er nógv virksemi í alivinnuni. Eisini eru Oyndarfjørður og Hellurnar væl dámd ferðamál. Harumframt er Oyndarfjørður ein bygd í menning, har grundleggjandi funktiónir eru til staðar sum grundarlag undir einum vælvirkandi bygdarsamfelag. Ein týðandi fortreyt fyri framhaldandi menning er góð og trygg vegaføring, ikki minst um veturin.

Meirilutin tekur undir við málinum og mælir Løgtinginum til at samtykkja uppskotið.

**Minnilutin** (Ruth Vang, Pauli Trond Petersen og Helena Dam á Neystabø ) er samdur við uppskotsstillarunum um, at vegateinurin treingir til ábøtur. Vegurin er breiðkaður partvís í valskeiðnum, men enn er ikki komið á mál.

Landsstýrismaðurin hevur kunnað Løgtingið um, at ítøkiligar ætlanir eru um í næstum at seta upp bilverju  á einum vegastrekki á 300 - 400 m, har tað verður mett neyðugt við atliti at ferðslutrygdini. Eisini sigur landsstýrismaðurin, at vegateinurin verður við í uppfylgjandi arbeiðinum við nýggjastu samferðsluætlanini, sum varð løgd fram í vár.

Við hesum viðmerkingum mælir minnilutin Løgtinginum frá at taka undir við uppskotinum.

**Fíggjarnevndin, 3. apríl 2019**

| | | |
|---|---|---|
| Bárður á Steig Nielsen<br>formaður | Ruth Vang<br>næstformaður | Helena Dam á Neystabø |
| Kristin Michelsen | Pauli Trond Petersen | Jacob Vestergaard |
| | Bill Justinussen | |